**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Úttøkuskipan til NMU 2026 í Oslo

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til Norðurlendsku Meistarastevnuna fyri Ung sum verður í Oslo 29. og 30. juni 2026.

Uppá tal eru tey sum í kravtíðarskeiðnum klára avrik yvir 600 AQUA (2026) stig á langgeil (50m).

Sí AQUA 2026 talvurnar her:

- Kvinnur: World-Aquatics-Points-LCM_2026_Female.pdf
- Menn: World-Aquatics-Points-LCM_2026_Male.pdf

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar, sum lýst í úttøkuskipanini til eyka úttøkur:

https://ssf.fo/kapping/uttokuskipan-til-eyka-uttokur/

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2026, og at velja luttøku frá um serligar umstøður tala fyri hesum. Kravtíðarskeiðið er frá og við 5. juli 2025 (NMU 2025), til og við 26. apríl 2026 (Swim Open Tórshavn).

Árgangirnir eru svimjarar føddir 2010-2013.

Viðkomandi svimjarar skulu hava galdandi antidopingprógv frá Anti Doping Danmark ella WADA, og eiga at luttaka í teimum fyrireikingum sum SSF skipar fyri, íroknað FM, uttan so at annað er avtalað.

Viðkomandi svimjarar skulu góðtaka at luttaka í møguligari liðsvimjing, uttan so at annað er avtalað.

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Feløgini verða hartil biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir viðkomandi svimjarar ið *ikki* ynskja úttøku, í seinasta lagi tá ið Swim Open Tórshavn byrjar.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS